# Mjørkaboksing hjá Arnstein Niclasen

HANS ANDRIAS SØLVARÁ



**Eitt meinaleyst referat**
Arnstein Niclasen undrast í Dimmalætting 10/2 yvir, at eg svari upp á eitt "*meinaleyst referat*" hjá honum av bíbliukjakinum í Miðlahúsinum. Heilt so meinaleyst var referatið hjá Arnstein Niclasen nú ikki. Tað er hansara aftursvar heldur ikki – um man kann kalla tað fyri eitt aftursvar.

Tá eg gav mær stundir til at svara upp á tað "*meinaleysa referatið*" hjá Arnstein Niclasen, so var grundin heilt einfalt tann, at Arnstein Niclasen tók sær rætt til at rættleiða meg uttan at hann hevði gjørt sær tann ómak at spyrja meg nærri um nevndu viðurskifti í Miðlahúsinum. Eftir øllum at døma er Arnstein Niclasen eisini nøgdur við svarið. Hann nevnir í øllum førum ikki eitt orð um, at mínar grundgevingar ikki halda. Tykist enntá tætt við at viðganga, at Gud arbeiðir gjøgnum náttúrligt úrval. Hann nevnir yvirhøvur einki um tær grundgevingar ella niðurstøður, sum eg legði fram í greinunum hjá mær. Men Arnstein Niclasen er týðiliga ónøgdur við, at eg havi dittað mær at givið honum svar.

**Arnsteinsk tokutala**
Tað tykist bara løgið, at Arnstein Niclasen ikki er áhugaður í at reka grundgevingarnar hjá mær aftur. Tí heldur enn at royna at afturvísa nakað av tí, sum eg førdi fram, leggur Arnstein Niclasen eftir mær persónliga og kemur við nýggjum ósannindum og høpissleysum uppáhaldum. Arnstein Niclasen tykist ikki halda tað vera neyðugt at grundgeva ímóti nøkrum av tí, sum eg føri fram, tí eg havi ikki lisið bíbilsku tekstirnar á upprunamálunum, og tí, at eg einans undirvísi á seminariistøði!? Nú kann eg upplýsa fyri Arnstein Niclasen, at eg havi undirvíst rættiliga nógv á lærdum háskúla, men tað er ikki í sær sjálvum grundgeving fyri nøkrum sum helst, tí poengið er, at tað eru grundgevingar og einans grundgevingar, sum telja. Hann fer enntá so langt av leið, at hann rør fram undir, at eg nýti arbeiðstíðina til at skriva greinar í!? Hvat skulu lesarar, sum eru áhugaðir í evninum, nýta tílíkt persónligt brigsl til? Og hvat sigur tað um Arnstein Niclasen?

Greinin er úr enda í annan ein vavgreytur av persónligum brigsli, sum einki hevur við sakina (evnið) at gera. Og so ger Arnstein Niclasen eisini nakrar heilt margháttligar logiskar brølarar, sum man skal leita leingi eftir – helst langt undir seminariistigi: Samstundis sum Arnstein Niclasen brigslar mær, at eg ikki havi lisið bíbilsku tekstirnar á upprunamálinum, heldur hann í ramasta álvara uppá, at eg átti at gagnnýtt arbeiðið hjá Victor Danielsen, sum var fólkaskúlalærari og ongantíð lærdi bíbilsku upprunamálini!?

Eg veit ikki um nakar skilir hendan heilt serstaka arnsteinska logikkin, men eg havi so ikki lært nakað um hann á nøkrum lærdum háskúla. Sjálvandi royni eg at grunda mínar greinar á granskarar, sum hava lisið og granskað bíbilsku handritini á upprunamálunum. Alt annað hevði verið ólogiskt. Her er Victor Danielsen ikki tann fyrsti, sum eg komi at hugsa um (og fyri at Arnstein Niclasen ikki skal miskilja meg, so er hetta ikki ein kritikkur av tí stóra arbeiði, sum Victor Danielsen gjørdi á øðrum økjum, men einans ein kritikkur av vantandi logiskum samanhangi í viðmerkingini hjá Arnstein Niclasen).

Eg haldi, at tað hevði sømt seg betur fyri Arnstein Niclasen at farið eftir bóltinum (sakini) heldur enn manninum (ad hominem). Men sjálvandi, fær man ikki hendur á bóltinum (les grundgevingunum), so er tað freistandi at royna at avlaga kjakið við at sáa misálit á boðberan. Tað sømir seg bara illa fyri Arnstein Niclasen og gagnar als ikki kjakinum.

**Arnsteinskar misskiljingar**
Nakar góður lesari tykist Arnstein Niclasen heldur ikki vera. T.d. leggur hann meg undir at "*høgga í*" prestaparið Anne Sophie og Paul Seidelin, sum ongan møguleika hava fyri at verja seg. Men tey, sum hava lisið viðmerkingarnar hjá mær vita, at tey bæði onga grund hava til at verja seg. Tað eru ikki sjónarmið hjá Anne Sophie og Paul Seidelin, sum standa fyri falli (hóast eg vísti á, at allir granskarar ikki eri samdir við teimum, heldur ikki brøður og evangelisktkristnir granskarar), men útleggingin hjá Arnstein Niclasen av tí, sum hann endurgevur úr bók hjá Anne Sophie og Paul Seidelin. Tað er ikki neyðugt at hava fingið frálæru á høgum stigi fyri at leggja merki til, at mín kritikkur ikki rakar Anne Sophie og Paul Seidelin, men einans tað, sum Arnstein Niclasen fær burtur úr tí, sum hann endurgevur úr teksti hjá teimum. Er tað nakað, sum eg eitt sindur misvísandi kann sigast at "*høgga í*", so eru tað tær skeivu grundgevingarnar hjá Arnstein Niclasen. Anne Sophie og Paul Seidelin siga snøgt sagt ikki tað í tí endurgivna brotinum, sum Arnstein Niclasen roynir at brúka endurgevingina til. Í veruleikanum legði eg heldur ikki eftir Arnstein Niclasen; eg vísti bara á, at hansara grundgeving er skeiv. Mótvegis grundgevingum ber einans til at seta fram mótgrundgevingar. Hinvegin ber væl til (og er tíverri alt ov ofta nýtt í máttloysi) at leggja eftir boðberanum, tá man ongar grundgevingar hevur.

Tað er einans eitt sjónarmið hjá Arnstein Niclasen, sum stendur fyri falli. Og Arnstein Niclasen er væl førur fyri at verja seg. Hann leggur bara ikki í ella megnar ikki at verja sítt sjónarmið. Tað hevur Arnstein Niclasen rætt til, men tað sømir seg hinvegin illa fyri hann, at hann av órøttum leggur meg undir at "*høgga í tey*" verjuleysu (ad hominem).

Tí tá leggur Arnstein Niclasen eftir boðberanum – enntá við følskum skuldsetingum.

**Perspektiv**
Viðmerkingin hjá Arnstein Niclasen er eitt skúladømi um skeiva próvførslu, har farið verður eftir manninum (ad hominem) heldur enn eftir bóltinum (sakini). Greinin er hesum viðvíkjandi so góð, at eg umhugsi at nýta hana í frálæruni í logikki í heimspeki á miðnámsskúlunum. Vanliga plagi eg ikki at gera viðmerkingar til persónligt brigsl og mjørkaboksing, men hesaferð helt eg, at eg skuldi takka fyri gott frálærutilfar.

**Men eg svari ikki uppá eina ad hominem grein afturat.**

# Politiska skipanin - ein svartur kassi

REIDAR NÓNFJALL



Politiska skipanin avrikar alt ov lítið í mun til tey krøv, sum sett verða frá umverðini og arbeiðir alt ov seint. Mál, sum hava stóran týdning fyri menningina av samfelagnum o. a., verða ikki viðgjørd – broytingarskjótleikin er í botn. Politikarar eiga ikki dagliga at taka sær av rakstraruppgávum í politisku skipanini – tað hava vit embætisfólk til. Politikarar eiga í mest møguligan mun at taka sær av at loysa stórar mennandi uppgávur, sum flyta mørk. Í almenna rúminum hoyra vit um politskt klandur, smámál, persónálop og verjurøður, og ikki minst uppliva vit politisku tøgnina um tey stóru strategisku málini, sum eiga at verða á politisku dagsskránni. Fólk og vinna sóknast eftir, hvussu politiska skipanin aktivt kann verða við til at menna tilverugrundarlag Føroya.

**Ein svartur kassi - black box**
Vanliga verður ein politisk skipan í politilogi´ini fatað sum ein black box, ella ein svartur kassi. Eitt mál kemur td. inn í eina afturlatnað skipan, verður viðgjørt í pyramidum og labyrintum, við valdskampum, avtalum, "politiskum handlum" o.a. Síðan kemur málið liðugt viðgjørt útaftur í einum øðrum enda, ella kemur málið ongantíð út aftur ella avskeplað – ókenniligt og óbrúkiligt.

**Politiska skipanin – ein black box**
Ein slík politisk skipan ger seg meira og minni galdandi í flestu demokratisku londunum - við vantandi gjøgnumskygni og opinleika. Í Føroyum er politiska skipanin eyðkend m.a. við, at stutt kann verða millum tey fólkavaldu og fólk á gøtuni – sostatt vil politikarin merkja eitt eyka trýst frá veljarum og fær tí trupult við at raðfesta ella velja rationellar loysnir. Hetta kann so aftur ávirka tær avgerðir ella output, sum skipanin framleiðir. Vit kunnu eisini siga, at borgarin og lobbyistar í ávísum førum eru beinleiðis partur av arbeiðinum í black boxini – serliga í okkara lítla samfelag.

**Fíggjarlógin 2009 í black boxini**
Viðgerðin av fíggjarlógini 2009 er eitt aktuelt og viðkomandi evni, sum kann setast inn í hesa black box-skipan. Nevnast kunnu sjálvandi eisini onnur størri politisk mál í sambandi við rakstur og íløgur. Fíggjarmálaráðið og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyrireika, samskipa og leggja fram eitt fullfíggjað fíggjarlógaruppskot 2009, sum síðan verður tikið inn í løgtingið og tess løgtingsnevndir. Tað, sum er farið fram í fíggjarnevndini kunnu vit bara gita um – td. samráðingar, avtalur og "politiskir handlar".

Upprunaliga uppskotið kemur síðan útaftur í hinum endanum og tey fólk, sum eru rakt ella partur av samfelagsskipanini undrast og eru skelkað av úrslitinum ella produktinum. Formaðurin í fíggjarnevndini hevur gjørt sín part av taktiska arbeiðinum so mikið gott, at aðrir løgtingslimir eru sovnaðir í tímanum - eru síðan vaknaðir við kaldan dreym, men ov seint.

Politiska toppleiðslan, sum eru landsstýrisfólkini, eru við hesum sett heilt út av spæl. Teirra leiðsluarbeiðið er við hesum undirminerað samstundis sum tey ikki fáa greitt at vita frá løgtinginum, hvørji nýggj mál og mið skulu fylgjast (ella eru ongi mál og mið?). Her vantar í stórt mát evnini og førleikin til politiskt *teamwork*.

*Tað er viðkomandi at spyrja:*

- Hvat er munurin á upprunaliga uppskotinum og tí, sum endaliga verður samtykt – eru ymiskir málsetningar, eru ymisk kriteriu brúkt fyri at býta rakstur og íløgur, er munur á raðfestingunum?
- Er endaliga fíggjarlógin 2009 vorðin eitt betri amboð til at leiða og stýra eftir í krepputíðum ella stuðlar best undir búskaparligan vøkstur?
- Hvørjar mannagongdir eru í heila taki brúktar og hvørjar eru formliga galdandi?
- Hvør er javnvágin í ávirkan í tilgongdina at gera fíggjarlóg – hvør hevur reella valdið og ávirkanina – persónar ella smærri alliansur - og er henda javnvág farin av sporinum?

Politiska skipanin sýnist at hava verið serliga afturlatin í tilgongdini at gera fíggjarlóg 2009 - fólk og stovnsleiðslur skulu nú bara eta og svølgja tað, sum verður serverað. Stóri trupulleikin við at viðgera fíggjarlógina við stórum afturlatni og uttan at lurta eftir sakkunnleikanum, td. aðalráðunum, er, at aktørarnir og tey, sum skulu brúka játtanir, fáa ikki at vita, hvørji mál liggja aftanfyri og kunnu tí heilt einfalt ikki taka undir við politiska arbeiðinum og tí, sum skipanin serverar. Henda reaktión er mentala náttúran í menniskjanum og eisini starvsfólkum – loyalitetur og álit fer í botn. Politiskt fylgja ongi greið mið og mál við játtanunum fyri hvørt øki sær, stovn o.a. – avsendarin hevur onki andlit.

**Boðskapir**
Føroyingar fingu í 1994 nýggja stýrisskipan og í 1996 nýggja fíggjarlógar- og játtanarskipan sum úrslit av búskaparkreppuni. Endamálið var at tryggja greiðari uppgávu-, ábyrgdar- og heimildarbýti millum løgting og landsstýri og millum landsstýrisfólk (málsøkini) - og annars effektivisera búskaparstýringina hjá landinum (serliga styrkja útreiðslustýringina) og skapa rættartrygd.

Politiska arbeiðslagið í praksis sigur kortini alt um, at ongin skipan er betri enn tey fólkini, sum manna hesa. Tað er nógv, sum bendir á, at vit hava politikarar, sum ikki virða mannagongdir og opinleika, soleiðis sum eitt demokrati og nýmótans virkisskipan eigur at virka innanfyri. Tað er eisini nakað, sum bendir á, at politiskt vald og vit/skil fyri tað mesta ikki fylgjast at fyri tíðina. Tað sýnist eisini sum, at tað enn verður førdur lokalpolitikkur í løgtinginum og lægsti felagsnevnari brúktur at raðfesta eftir.

Politiski myndugleikin antin eksperimenterar ella letur standa til í samfelagnum – og roknar við, at loyvast kunnu nógvir størri og smærri feilir og bara koyra víðari. Politiska skipanin beinleiðis undirmetir álvarsligu avleiðingarnar av vantandi langtíðaráetlanum og vantandi leiðslu, stýring og raðfesting.

Spurningurin er, um politikarar hava neyðuga innlitið í, hvat veruliga hendir í samfelagnum, í vinnuni, í fyritøkunum, millum fólk, í húskjunum, í kommununum og í útheiminum? Er tað so, at innlitið er lágt, so er væl skiljandi, hví ongin kann svara uppá, hvørjir strategiskir boðskapir eru frá fíggjarlógini fyri 2009 og ongi greið útspæl um málsetningar fyri framtíðina. Ein samfelagsbúskaparlig kreppa, sum Føroyar eru í, krevur greiðar politiskar útmeldingar úr *black boxini*.

Spurningurin er, hvussu fíggjarlógin 2010 fer at verða viðgjørd.